# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Hvør heldur eyga við hvørjum?

Fíggjarmálaráðharrin meldaði út herfyri , at framyvir skulu øll ráðini mánaðarliga játta yvirfyri Gjaldstovuni, at nýtslan undir ráðunum er rímilig í mun til játtanina. Hetta er ikki nakar nýggjur tanki úti í Fìggjarmálaráðnum, men nú sær út til, at tað hevur eydnast at fingið ein landsstýrismann at føra hetta út í lívið.

Verandi játtanarskipan er merkt av misáliti. Stovnsleiðarar og stjórnaráð verða viðfarin sum børn, og úrslitið er hareftir. Hygg til dømis eftir hvussu landið keypir inn í stórum við ársenda. Hetta gera stovnsleiðarar, tí at vanligt er, at teir missa av játtanini árið eftir, um ikki hvør króna verður brúkt.

Hóast skipanin tykist margháttlig, so sær ikki út, sum bati er á veg. Heldur hinvegin, so ætlar ein at ómynduggera stjórnarráðini eitt sindur meiri enn í dag, og harvið vísa eitt sindur klárari, at Fíggjarmálaráðið trýr uppá skipanir, sum taka initiativ frá fólki. Hvat er incitamentið hjá einum stovnsleiðara at spara, um hann bara fær uppaftur minni játtan í næsta ár afturfyri? Hvør er motivatiónin hjá einum stovnsleiðara at optimera raksturin og velja tey bestu amboðini, tá Fíggjarmálaráðið veit best og vil sleppa at diktera í detaljum heldur enn við generellum krøvum um, hvørji amboð skulu nýtast?

Veruligi trupulleikin við fíggjarlógini er ikki fíggjarstýring. Veruligi trupulleikin er politiskt undirbudgettering og ov nógv toppstýring, og tað finst eingin skipan til at rætta uppá tað. Tað skal politiskur ryggur til. Okkum tørvar ein landstýrismann í fíggjarmálaum, sum torir at seta spurnatekin við disponeringarnar í fíggjarmálaráðnum farnu árini. Okkum tørvar ein landsstýrismann sum torir at útdelegera til stýrini og kroysta ábyrgd og autoritet longur niður í skipanina, heldur enn at ómynduggera og centralisera.

Áðrenn landstýrismaðurin í fíggjarmálum fer at menna KT skipanir hjá Gjaldstovuni, so eigur hann at upplýsa, hvat Fíggjarstýringsskipan Landsins hevur kostað at ment, og hvat hon kostar í árligum rakstri og umsiting alt íroknað. Hesi tølini eigur hann so at samanbera við tilsvarandi skipanir, sum verða nýttar aðrastaðnis. Hetta er ikki meir enn ein sjálvfylgja, nú fíggjarmálaráðharrin ætlar, at stýrini skulu standa skúlarætt fyri Gjaldstovuni mánaðarliga.

Eisini átti landsstýrismaðurin í Fíggjarmálum at hugt eftir sínum egnu stovnum, fyri at vita, um ikki har verður brúkt ov nógv, ella um ikki onkur teirra er í so stórur í mun til fólkatalið. Landsstýrismaðurin sigur, at Gjaldstovan skal halda eyga við øllum tí almenna. Hvør skal halda eyga við Gjaldstovuni og Fíggjarmálaráðnum?

**Sosialurin**

## Er Pauli ein kúllur?

JOHAN PETERSEN



**Í eini sera vælskrivaðari grein hartar fyrrverandi formaður Sambandsfloksins, Pauli Ellefsen, leiðslu floksins. Men Pauli veit, at fyri at kunna gjøgnumføra reindyrkaðan sambandspolitikk, er neyðugt, at flokkurin hevur 50% av atkvøðunum ella meir. Ein floksformaður í nýggjari tíð hevði helst havt megnað tað. Bert spell, at hann stakk halan millum beinini í úrtíð**

Í eini, sum altíð hjá Paula Ellefsen, sera vælskrivaðari grein, viðger Pauli búskaparpolitikkin hjá samgonguni seinastu 35 árini. Hetta ger hann, sum vanligt, á ein sera greiðan og sannførandi hátt. Burtursæð frá byrjanini og endanum av greinini, er hetta føroyskur politikkur í einum nøtuhylki í hesum tíðarskeiði.

Men okkurt er, sum nívir Paula, tí hann byrjar við eini villleiðing av samgonguskjalinum hjá ABC-samgonguni, og tí verður niðurstøða hansara sjálvandi eisini skeiv.

**Hvat er 15% av o. s. fr.?**
Pauli siterar úr samgonguskjalinum, at "*... ríkisveitingin verður lækkað við 15% ... o.s.fr. o.s.fr.*" Men sigur tú prosent, mást tú eisini siga av hvørjum. Íðan dugir Pauli ikki at rokna procent? ella er Pauli blivin í ørviti? ella er Pauli ein kúllur?

Sum útbúgvin grannskoðari veit Pauli sjálvandi alt um prosentrokning, so tað er ikki orsøkin. Vælskrivaða greinin hjá hesum oratoriska begávilsinum minnir um fordóms politiska orðaleikin, so í ørviti er hann heldur ikki, so tað er ikki orsøkin. Er Pauli altso so ein kúllur? Tað hava í hvussu so er okkara mótstøðumenn mangan sagt.

**Fornuftspolitikkur mótvegis kenslupolitikki**
Allir føroyingar vita, at sambandspolitikkur byggir á fornuft, vit og skil. Teir vita eisini, at allir hinir flokkarnir uttan undantak byggja sín politikk á kenslur, ja kanska serliga undirlutakenslur.

Politiska skipanin og viðurskiftini eru nú einaferð so, at neyðugt er við fleiri flokkum at mynda landsstýri. So hjá Sambandsflokkinum at samráðast við flokkar, sum bert hugsa í kenslum og undirlutakenslum, er torført. Í slíkum føri er ofta neyðugt av psykologiskum grundum at geva hinum eitt veti rætt, fyri at teir ikki skulu fara heilt í baklás. Spyr bara ein sálarfrøðing.

**Hevur Pauli ikki hugsað tað?**
Tí stendur í samgonguskjalinum, ikki at "*... ríkisveitingin verður lækkað við 15% ... o.s.fr. o.s.fr.*", men at "*... ríkisveitingin verður lækkað við 15% av reella inntøkuvøkstrinum ...*". Og tað er sjálvandi nakað heilt annað.

Tað vil við øðrum orðum siga, at 85% av búskaparvøkstrinum fer til at bøta um blokkniðurskurðskatastrofuna og annars at royna at byggja upp eitt vælferðarsamfelag, eisini í ringum tíðum. Og tað er ikki so býtt.

Men nú er stígur í búskapinum, og inntøkuvøksturin er negativur. Og negativur inntøkuvøkstur merkir sjálvandi, at blokkurin skal hækka! So kanska Sambandsflokkurin fyrst fær prístalsvøksturin inn aftur í blokkin. Og tað er heldur ikki so býtt, Pauli?

**Sambandsflokkurin kann fáa avgjørdan meiriluta**
Um Sambandsflokkurin hevði avgjørdan meiriluta á Løgtingi, hevði ikki verið neyðugt at gjørt slíka neyðsemju við aðrar. Í nýggjari tíð **hevur** Sambandsflokkurin havt ein formann, sum uttan iva hevði megnað at fingið flokkinum avgjørdan meiriluta, men tíverri stakk tann formaðurin halan millum beinini í úrtíð.

Men nú, tá ið fyrimyndin hjá íslandssambandsmonnunum er rapað, og Sambandsflokkurin hevur ein ungan, ágrýtnan, dugnaligan, dámligan og semjusøkjandi formann, kann gott vera, at hetta fer at eydnast.

So, Pauli! Alternativið **er** Sambandsflokkurin.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Lesið Sosialin - so eru tit við

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.